


**NIÐURSLITIÐ**

*Verður vegakervið ikki røkt og skaðar umvældir so hvørt, versnar skaðin og kostnaðurin verður nógvar ferðir størri. Sum støðan er nú við nógv avmarkaðari játtan, mælir Landsverk tískil til at halda aftur við at gera nýggjar vegir og heldur raðfesta játtanina til at røkja tað vegakervið, vit longu hava, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Valdu at asfaltera

Tá ið kreppan var í nítiárunum og játtanin varð munandi lækkað, legði Landsverkfrøðingurin tann taktikk, at brúka sum mest av pengum til at asfaltera fyri, so at fólk ikki skuldi leggja so væl merki til kreppuna, til játtanin hækkaði aftur.

– Trupulleikin er bara, at játtanin hækkaði ongantíð aftur síðani tá og tí eru vit vit so langt afturút í at røkja vegir, tunlar og brýr, at støðan er sera álvarslig, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

*aki@sosialurin.fo*

# 30 ár ímillum hvørja asfaltering

**ASFALTERING** Landsverk megnar bert at asfaltera helvtina av tí, sum er neyðugt á hvørjum ári

**Áki Bertholdsen**

Í árunum frá 1989 til 1999 vóru einir 40 kilometrar av vegi endurasfalteraðir um árið. Tað eru 9% av samlaðu vegalongdini, sum er einar 450 kilometrar.

Bara fyri at halda stand og varðveita vegirnar á einum nøktandi støði, skulu vit asfaltera minst 30 kilometrar av landsvegi um ári. Men játtanin er so lág, at vit klára bara at asfaltera einar 15 kilometrar um árið. Tað er ikki meiri enn 3% av samlaðu vegalongdini.

– Skilligt er, at við hesi játtan verða í miðal 30 ár ímillum, at vegir verða asfalteraðir. Men livitíðin fyri asfalt er bara eini 15- 20 ár og tí forfellur vegakervið skjótt, sigur Landsverk.

Hendur onki munagott nú, fer tørvurin á asfaltering at e±ksplodera tey næstu fimm árini og avleiðingin kann skjótt verða, at vegirnir verða í so vánaligum standi, at vit verða noydd til at mæla til, at hámarksferðin verður sett niður á ávísum teinum av trygdarávum.

*aki@sosialurin.fo*



**KREVJANDI**

*Landsverk skal gera meira fyri minni*

# Gera meira fyri minni

**LANDSVERK** Hóast játtanin til Landsverk er munandi minkað, hevur stovnurin fingið fleiri týðandi uppgávur afturat

**Áki Bertholdsen**

Umframt samferðslukervið á landi, fevnir virksemi hjá Landsverki eisini um rakstur og viðlíkahald av havnum, bygningum og tyrlupallum og øðrum.

Eisini játtanin til tey endamálini er nógv skerd.

– Í 1996 var samlaða játtanin 75 milliónir krónur og í 2009 var hon 68 mió. krónur, ella sjey milliónir krónur lægri, sigur Oyvindur Brimnes.

– Verður lagt upp fyri prísvøkstri og øðrum, skuldi játtanin nú verið 107 milliónir, vissi hon skuldi verið á sama støði sum í 1996.

Í prosentum er sostatt talan um, at játtanin er lækkað heili 35% til hesi endamálini

Og hóast játtanin til Landsverk er munandi lækkað hesi árini, hevur stovnurin síðani fingið eina týðandi uppgávu afturat og tað er at umsita allar bygningar hjá landinum.

### Brúka bara helvtina

Í Føroyum er játtanin til at halda vegakervið hjá landinum viðlíka, góðar 108 krónur fyri meturin av vegi. Í Danmark er játtanin 225 krónur til 2-breytaðar vegir, sum líkast okkara og í Noregi er játtanin 203 krónur fyri meturin

Landsverk sigur, at Noreg tað landið, vit best kunnu samanbera okkum við.

Ein byrjan til at endurreisa vegakervið í Føroyum, kundi verið at økt játtanina minst 12 milliónir krónur um árið til tunlar og brýr. Harafturat má syrgjast fyri, at vegakervið ikki framhaldandi forfellur, og tí mæla vit til, at játtanin til viðlíkahald eisini verður hækkað 14 milliónir krónur um árið

*aki@sosialurin.fo*

**» Ein byrjan til at endurreisa vegakervið, kundi verið at økt játtanina minst 12 milliónir krónur um árið til tunlar og brýr**